# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



10. juni fingu Andre 10 ár, Julia 5 ár og Ida 1ár hesa fittu didduna. Hon vigaði 3930 gr og var 54 cm long. Foreldrini eru Álvgerð Johannesen og Tormann Jacobsen, Tvøroyri.

24. mai fingu Edit Vessel, Keypmannahavn og Andrias Rasmussen, tórshavn ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3800 gr.

13. juni fingu Ruth m Garðarnar og Magnus Berg, Hvalba eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3200 gr.

15. juni fingu Liljan og Kári Strøm, Tvøroyri, tvíburar, gentir. Onnur var 50 cm long og hin 51 cm long. Onnur vigaði 2600 gr. og hin 2650.

15. juni fingu Sanna Klein og Andreas Klein Arnbjerg, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3650 gram og var 54 cm langur.

18. juni fingu Helga Bára Mohr Vang og Harald Hammer, Strendur eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 2720 gr.

20. juni fingu Birna Dahl Jacobsen og Ferouz Torki, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 4178 gr og var 54 cm langur.

20. juni fingu Anna Krog Hentze og Virgar Hentze, Sandur eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3500 gr.

21. juni fingu Sunrid Nielsen og Ólavur Nielsen, Syðragøta, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4800 gr.

22. juni fingu Gerda Nattestad og Hjalti Petersen, Sandavágur ein son. Hann var 55 cm langur og 4085 gr.

## Prógv

Sólrun Foldbo fekk týsdagin 16. juni prógv sum heilsusystir í Aarhus Universiteti.

Dagurin
26. juni. Pelagius, deyður umleið ár 925. Ein 10 ár gamaldrongur, sum varð tikin av døgum, tá ið maurar ráddu í Spania.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Lesið Sosialin

# Hjørdis Huus, 80 ár

Sunnudagin 28. juni verður Hjørdis Huus í Havn 80 ár. Hjørdis er elst av sjey systkjum. Hini systkini eru Brynjolf (1931-1998), Áslak f. 1933, Tollakkur (1934-2009), Herálvur f. 1936, Hjartvar f. 1938 og Tordis (1939-2002.)

Mamman, Jona, var av Hvítanesi og pápin, Juul Poulsen, var úr Havn.

Hjørdist giftist 47 ára gomul við Peter Huus (1914-1995) úr Syðrugøtu, sonur Dortheu og Líggjas Huus. Tey fingu næstan 20 ár saman. Tey vóru so seint gift, at tey vildu halda eitt rættuligt koparbrúdleyp.

Hjørdist fekk eingi børn sjálv. Men hon hevur verið sum ein omma hjá okkum børnum hjá systkin hennara. Tey hava ikki verið so fá heldur, millum 20 og 25. Omma doyði longu í 1968, so tey flestu av okkum børn hjá systkin hennara minnast bara hana sum ommu okkara !



Hon hevur eisini verið sera ommulig. Á føstulávint skipaði hon fyri tunnusláttur fyri okkum og øllum børnunum í grannalagnum. Vit slerdu tunnu ella pottar uttanfyri og so inn at fáa okkurt gott at eta aftaná. Tá vóru ikki so nógv hús undir Gráasteini, men tað vóru nógv børn! Hon hevði eisini bindiklubb og tónleikaklubb við gentunum!

Hjørdis hevur sítt virkna lív arbeitt á Líkningarráðnum. Hon er friðarlig, men kann eisini siga sína meining.

Føðingardagurin verður hildin úti á Hamrinum á Argjum hjá bróðurdóttrini Eddu Hjartvarsdóttir, Ryggsgøta 23.

Tað er opið hús frá klokkan 17 við einum násturðabita.

Vit øll ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum 80 árunum, sum tú ber væl. Tað sóu vit ikki minst í Degi og Viku um dagarnar saman við "tínum" postboði.

**Ommubørnini**

# Sjúkrarøktarfrøðingar

Hósdagin 25. juni fingu Dina Rachel Haahr av Signabø, Sylvia Sivertsen úr Klaksvík og Marita Sivertsen av Viðareiði prógv sum sjúkrarøktarfrøðingar. Tær hava lisið á Professionshøjskolen Metropol í Keypmannahavn.



*F.v.: Dina Rachel Haahr, Sylvia Sivertsen og Marita Sivertsen*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

# Hægsta miðalkarakter og bestu uppmøting



Mynd frá Handilsskúlanum á Kambsdali. Hægsta miðalkarakter hevði Vivian Tausen, sum hevði 10,0 í miðal, og bestu uppmøting høvdu Linda Bjørk Herjólfsdóttir og Tina Berthelsen, sum báðar høvdu eina fráveru upp á 7 tímar í 3 ár.